# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
17. november 2008 fingu Barbara Brattaberg og Pauli Trond Petersen, Vestmanna ein son. Hann eitur Petur Peng Paulason Brattaberg, og er føddur 12.04.2006 í Chengdu, Kina.



*Her er Petur saman við stórabeiggja sínum Torsteini*

8. november fingu Dea og Petur Petersen, Gråsten, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2860 gr.

21. november fingu Annbritt og Alex Jacobsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3790 gr.

22. november fingu Hannefía og Jens Pauli Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

24. november fingu Vígdis Berg og Birgir Strøm Rasmussen, Trongisvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3450 gr.

26. november fingu Gerda og Rúni Mortensen, Streymnes, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3750 gr.

28. november fekk Súsanna Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2750 gr.

28. november fingu Sigrun Hansen og Andrias Højgaard, Toftir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2850 gr.

28. november fingu Judith og Jørgin Thomsen, Skáli, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 4600 gr.

28. november fingu Ingirið og Bjørn Mittelstein, Skopun, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4450 gr.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 7. desembur verður Solveig Strøm, við Kráir í Vági, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**70 ára føðingardagur**
Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur k/j, fyrrv. landsstýris- og løgtingmaður, Klakksvík, verður 70 ár leygardagin hin 6. desembur 2008. Í tí sambandi verður opið hús í prestagarðinum á Brekku leygardagin frá kl. 16.

**75 ár**
Leygardagin 6. desember fyllir Johanna Danielsen, Hósvík, 75 ár. Dagurin verður á Giljavegi 40 frá kl. 10.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
Í dag, 5. desembur hava hjúnini Ragnar og Elsa í Holusteini verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Kongshavnar kvinnufelag sunnudagin 14. desembur, opið hús er frá kl 17.

## Minningarorð um
# Fíu Svabo Lützen
## sjúkrasystir, Tórshavn



Fía var fødd í Miðvági 4. juni 1940, nógv yngst av 5 systkjum, eftirnølarin. Hon vaks upp í einum tryggum barnaheimi, forkelað av foreldrum og systkjum.

Sum nógvar ungar gentur tá í tíðini, fór hon úr skúlanum 14 ára gomul. Tænti í Havn, arbeiddi á hotelli í Keypmannahavn, og sum skrivstovukvinna á Skipafelagnum, samstundis sum hon tók handilsskúlaprógv.

Í september 1961 byrjaði á fyrsta sinni sjúkrasystraforskúli í Føroyum á Føroya Fólkaháskúla. Ímillum tær 20 næmingarnar byrjaði eisini Fía. Eitt slíkt 5 mðr. háskúlaskeið kravdist fyri at sleppa inn á Sjúkrasystraskúla Føroya.

Lærutíðin hjá okkum byrjaði 1.februar 1962 og var liðug 3. apríl 1965. Hetta var ein rík og stuttlig tíð, ikki minst takka verið Fíu

Fía arbeiddi sum sjúkrasystir á medicinsku deild B7 í nógv ár. Eitt skifti var hon á Lágargarði og hesi mongu síðstu árini hevur hon arbeitt á Psykiatrisku deild 5. Umframt hetta hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir í De Gamles By í Keypmannahavn, eitt skifti avloysari á Hotel Tórshavn. Tikið eftirútbúgving á Bispebjerg Hospital. Eitt tíðarskeið í 90unum arbeiddi hon 6 mðr. í Nuuk í Grønlandi.

Hon fór frá í 2007 sum 67 ára gomul, men hevur hon síðani tá tikið vaktir á deildini til stutt áðrenn hon brádliga andaðist 3. august 2008.

Fía tók starv sítt í fullum álvara, var arbeiðssom og nærløgd, og hon var avhildin av starvssfeløgum, sjúklingum og avvarandi.

Í 1962 giftist Fía við Jacob Lützen, og saman fingu tey Bjørg í 1962 og Knút í 1968. Bjørg og Knút eiga tilsaman 6 børn. Fía hevði stóra umsorgan fyri sínum børnum og ommubørnum, og gekk høgt uppí, at tey øll høvdu tað gott.

Í 1965 fluttu Fía og Jacob í nýggj hús á Lútzenstrø, og í teirra hugnaliga heim kom nógv fólk, bæði vinir og familja. Gestablídni treyt ikki.

Fía var ein sermerkt kvinna heilt frá ungum árum. Hon hoyrdist, har hon var, hon var livandi, og ein visti altíð, hvar ein hevði hana.

Fíu dámdi væl at ferðast, serliga á teimum griksku oyggjunum, og seinasti túrurin skuldi havt verið til Rhodos í septembur í ár.

Fáur verður spardur fyri mótgongd og sjúku,og soleiðis heldur ikki Fía. Hon tók sær sera nær, tá fyrst ein systir og síðani ein beiggi gjørdust álvarsliga sjúk og doyðu, meðan tey enn vóru í fjøritiuárunum. Bæði síni foreldur misti hon áðrenn hon varð tríati ár. Sjálv hevði Fía giktfepur sum barn, og hetta kom at ávirka heilsuna alt lívið, serliga tey seinastu árini.

Fía var ein góð og trúføst vinkona, men nú er røddin tagnað. Eingin Fía er í hinum endanum á telefonini. Góða Fía, vit sakna teg nógv og takka fyri at vit høvdu tað gleði at kenna teg,

Okkara samkensla fer til Bjørg og Knút við familju

Við hesum fáu orðum vilja vit lýsa frið yvir minni um Fíu.

**Poula og Sølvá**
*Tórshavn, 2008.11.26*

**Dagurin**
**5. desember. Sabina**. Nógvar halgikvinnur bera hetta navn, men eingin tykist at hava samband við henda dag. Hildið verður tí, at talan er um tann halga mannin Sankta Sabas, ið er kendur kleysturbyggjari í Palestina. Hann doyði umleið ár 532.

**6. desember. Nikolaus**, deyður umleið ár 350. Hann var biskupur í Myra, sum er í Lítlaasiu. Hann varð tikin av døgum sum pínsluváttur, men við grøv hansara í Myra hendu so mong undurverkini, at hann skjótt varð roknaður sum halgimenni. Niklasar- ella niklasmessa hevur verið hildin í Føroyum. Og ein gomul føroysk vísa er um Niklas, har niðurlagið er: Hjálpi mær Guð og ríki harrin, Sankta Niklas.

**7. desember. Agaton**, deyður ár 250. Rómverskur hermaður, sum var kristin og varð tikin av døgum, tá ið Decius var keisari. Grikska navnið merkir góður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Fm'08 finalan beinleiðis á netinum

Finalan í tónleikakappingini Fm'08, sum Margarinfabrikkin skipar fyri, verður send beinleiðis á internetinum. Sum nakað nýtt fáa øll møguleikan at fylgja við í síðsta umfarinum av FM'08. Finalan verður send beinleiðis frá nýggju heimasíðuni hjá Margarinfabrikkini: www.fabrikkin.fo

Øll kunnu fylgja við, óansæð hvar ið tey eru stødd, bara tey hava atgongd til alnótina. Bæði mynd og ljóð verður sent.

Finalan í FM'08 tónleikakappingini verður leygarkvøldið 6. desembur kl 20.00 í Reinsarínum Hesir bólkar fara at kappast um at gerast Føroya besti nýggi bólkur: Moby the Pink Pilot, 3st, Oniontree, Reverb, Moustache og Collapse. Atgongumerki á kr. 100,- fáast í Tutlhandlinum, í Margarinfabrikkini og við dyrnar.

